umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **Sp/f Betongblandistøðin** | |
| Bústaður hjá virki: **Froðbiarvegur 156** **825 Froðba** | |
| Galdandi fyri virksemi: **Betongblandivirki** | |
| Matr. nr.: 13 | V-tal 492507 |
| Mál nr.: 17/00620 | Galdandi frá: 18.12.2020 |

Argir hin 18.12.2020

Suni Petersen, deildarleiðari

Sjúrður J. Ferjá,
umhvørvisviðgeri

# 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av betongblandistøðini hjá Sp/f Betongblandistøðin, matr. nr. 13 í Froðba, er givin við heimild í §§ 26, 29 og 31 og í umhvørvisverndarlógini[1] og §1, nr. 4 í kunngerð[2] nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Virksemi at framleiða betong eru í bólki B í fylgiskjali til løgtingslóg um umhvørvisvernd. Hetta virksemið er fevnt av kapittul 5 í lógini[1], og skal tí hava umhvørvisgóðkenning. Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka dálking, heilsuskaðar og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

Í 5 ár eftir, at góðkenningin er givin, kann Umhvørvisstovan sambært §34, stk. 4 og 5 í lógini[1], broyta góðkenningartreytirnar, um so er, at

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast, tá góðkenningin var givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin og dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella minni dálkandi útbúnaður er komin fram.

Umhvørvisstovan hevur m.a. brúkt norðurlendskar vegleiðingar og góðkenningar sum grundarlag til at áseta treytir.

Kunngerð sum annars er galdandi fyri hetta virksemi er kunngerð nr. 147 frá 1995 um burturkast við seinni broytingum. Kunngerð nr. 111 frá 2009 um spillivatn.

Umhvørvisgóðkenning er givin við teimum treytum, sum eru lýstar í kap. 4, Góðkenningartreytir. Treytirnar eru settar við støði í umsóknini, tilfari, sum er lagt aftrat, og teimum upplýsingum, sum eru komnar fram undir málsviðgerðini.
Eftirlitið við virkseminum verður útint sambært kap. 7 í lógini.

---

[1] Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum,

[2] Kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

## 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 6. november 2018 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá Sp/f Betongblandistøðin í Froðba. Talan er um virksemi á matrikul nr. 13 í Tvøroyrar kommunu. Tvøroyrar kommuna er eigari av matriklinum.
Umhvørvisstovan hevur eisini móttikið tekningar, sum vísa innrætting, framleiðslu, botnfellingarbrunn og spillivatnsleiðingar. Móttikna tilfarið hevur saman við vitjan á staðnum og samskifti, verið grundarlag undir viðgerðini av umsókníni.

## 3. Virksemi og umhvørvisviðurskifti

Virkið er á matr. nr. 13 í Froðba. Virkið liggur í økið C eftir byggisamtyktini, sum er vinnuøki.

Framleiðslan av betongi fer fram í einum fullautomatiskum tvangsblandara. Sandur og skervur verður lessaður í anleggið við hjóllessara. Sement verður fylt í anleggið gjøgnum sementsniglar frá sementsilo. Tilsetingarevni, so sum luftíblandievni og plastifiseringsevni, og vatn, verða eisini tilsett. Síðani verður lidna betongið ført frá blandara í betongbil við transportbandi.

Vatnnýtslan er mett til at verða áleið 140 l pr. framleitt kubikk av betongi og uml. 1.000 l pr. framleiðsludag til vasking. Sement verður móttikið og goymt í sementsilo. Eisini verður nakað av sementi á goymslu í stórsekkjum.

Framleiðslan verður ikki mett at fara upp um 3.000 $m^3$ pr. ár.

Virksemið fevnir um:

- Blanding og útkoyring av betongi umframt goymsla av sementi, sandi og skervi.
- Vasking av betongbilum.
- Goymslu av rávørum.

Virkið hevur ein vaskibrunn, sum er gjørdur á tann hátt, at ein betonggarður er stoyptur rundan um eitt øki, sum er aftan fyri har bilarnir verða vaskaðir. Hesin brunnur virkar samstundis sum ein botnfallsbrunnur, har betongslam verður lagt til avvatningar. Betongslammið verður síðani latið til góðkendan móttakara ella endurnýtt.

Virkið fer at hava ein botnfellingarbrunn, sum spillivatn og vatn frá vaskibrunninum, verður leitt í. Botnfellingarbrunnurin verður 10 m til longdar, 2 m breiður og 1 m djúpur, við trimum kømurum. Vatnið verður eftir botnfellingarbrunn leitt í ein oljuskiljara. Sýnistøkubrunnur verður á útleiðingini, og útleiðingin verður íbundin í kommunalu spillvatnsleiðingina.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á spillivatnsútleiðing, betongslammið, útlát av dusti og goymslu av rávørum.

# 4. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

## 4.1 Almennar treytir

4.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini. Góðkenningin er galdandi fyri alt arbeiði, sum verður gjørt í samband við virksemi.

4.1.2 Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

4.1.3 Sp/f Betongblandistøðin rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

4.1.4 Virksemið má ikki broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á nakran hátt uttan at søkt verður um nýggja góðkenning. Harafturat skal navnabroyting og/ella eigaraskifti fráboðast Umhvørvisstovuni.

4.1.5 Um virksemið steðgar fyribils, skal tilfar og útgerð uttandura antin tryggjast soleiðis, at tey ikki eru til ampa fyri umhvørvið ella beinast burtur. Harafturat skal eigari tryggja at olja, kemikalii ella annað ikki kunnu verða til ampa ella kunna dálka umhvørvið meðan virkið liggur stilt.

4.1.6 Heldur virksemið uppat, skal Umhvørvisstovan hava boð um hetta í minsta lagi tríggjar mánaðir frammanundan at virksemið steðgar, við eini ætlan um, hvussu virkið verður riggað av.

4.1.7 Miðast skal eftir at brúka bestu tøku tøknina, ið hevur minst møgulig árin á umhvørvið.

## 4.2 Spillivatn

4.2.1 Tætt undirlag skal vera á økinum har betongframleiðslan og vask av bilum fer fram. Botnfellingarbrunnur skal gerast, soleiðis at bitlar í spillivatninum kunnu botnfella. Tað má ikki verða sjónlig dálking ella upphópan av betongi at síggja við munnan á spillivatnsútleiðingini.

4.2.1 Botnfellingarbrunnurin skal tømast eftir tørvi. Um botnfallið ikki verður endurnýtt, skal tað avvatnast og latast góðkendum móttakara.

4.2.2 Vatn frá vaski av bilum skal leiðast í reinsiskipan, sum tryggjar at betongslam og møgulig olja ikki verður leitt út.

4.2.3 Restir av blandaðum betongi skal goymast á hóskandi staði, áðrenn tað verður endurnýtt ella latið góðkendum móttakara.

4.2.4 Reingerðarevni ið verða nýtt til vask av bilum, skulu vera skjótt separerandi reingerðarevni, soleiðis at møgulig olja kann haldast aftur.

4.2.5 Sýni skulu takast av spillivatninum, ið verður leitt út. Sýnini skulu takast úr sýnistøkubrunni eftir reinsiskipanina meðan virkið er í fullum rakstri. Sýnini skulu takast hálvárliga í 3 ár. Hereftir verður støða tikin til um reinsingin er nøktandi ella um krøvini til reinsingina skulu herðast ella um framhaldandi kanningar skulu gerast.

4.2.6 Spillivatnið skal kannast fyri:

- Olju (mineral)
- Suspenderað evni
- Botnfellilig evni

Og skal lúka hesi markvirðir:

- Olja 10 mg/l
- Suspenderað evni 300 mg/l
- Botnfellilig evni 10 mg/l

4.2.7 Verða markvirðini ikki yvirhildin, skulu hóskandi tillagingar gerast á reinsiskipanina.

## 4.3 Betongslam

4.3.1 Betongslammið skal latast til góðkendan móttakara ella endurnýtast.

## 4.4 Goymslur

4.4.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Goymslur skulu innrættast soleiðis, at møguligir lekar og spill kunnu haldast aftur.

4.4.2 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

## 4.5 Útlát til luft

4.5.1 Á sementsilo skal vera filtur, sum loyvir í mesta lagi 25 mg av dusti pr. $m^3$ av luft.

4.5.2 Umhvørvisstovan kann krevja at sýni verða tikin av luftútleiðingini á sementsiloini.

## 4.6 Óhapp

4.6.1 Um dálking kemur fyri vegna óhapp[3] skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til at avmarka avleiðingarnar.

4.6.2 Óhapp, sum hava ella kunnu hava umhvørvisligan týdning, skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

4.6.3 Har vandi er fyri spilli av kemikalium, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 4.7 Burturkast

4.7.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[4], og skal latast til góðkendan móttakara.

4.7.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

4.7.3 Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

## 4.8 Óljóð

4.8.1 Ískoytið til óljóð[5] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)

| | **mán – frí kl. 07 – 18 leyg. Kl. 07 - 14** | **mán – frí kl. 18 – 22 leyg. kl. 14 – 22 sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22** | **Allar dagar kl. 22 - 07** |
|---|---|---|---|
| **Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

*Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð frá virkseminum 35 dB.*

4.8.2 Um ampar verða av óljóði frá virkseminum, kann Umhvørvisstovan krevja óljóðsmátingar gjørdar, tó í mesta lagi einaferð um árið.

[4] Kunngerð nr. 147 frá 19. okt. 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. sept. 2007

[5] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

## 4.9 Rakstrarskrásetingar

4.9.1 Sum partur av innaneftirlitinum, skal regluligt eftirlit vera við dustfiltrum og spillivatnsreinsiskipanum, í minsta lagi eina ferð um árið. Virkið skal hava skrivliga mannagongd fyri eftirlitinum, so sum títtleika, eftirlitsskjøl o.a.

4.9.2 Virkið skal gera árliga umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti herundir møgulig óhapp, gjørd og ætla umhvørvistiltøk, eftirlit við reinsiskipanum, tøming av brunnum o.a. og senda hana til Umhvørvisstovuna í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

4.9.3 Virkið skal skráseta nøgdir av:

- Burturkasti
- Sementi
- Sandi
- Skervi
- Reinsing og viðlíkahald av reinsiskipan (dagfesting)
- Óhapp (frágreiðing um hvat er hent og hvussu bøtt var fyri umhvørvisdálking)

# 5. Málsviðgerð

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at fyribyrgja og avmarka dálking av umhvørvinum
- at innaneftirlit fer fram
- at reinsiskipanir eru undir reguligum eftirliti,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, skal minkast mest møguligt.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð hin 14. oktober 2020 sent Tvøroyrar kommunu og Sp/F Betongblandistøðini til hoyringar.
Hvørki Sp/F Betongblandistøðin ella Tvøroyrar kommunu høvdu nakra viðmerking.

## 6. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til Umhvørvis- og vinnumálaráðið saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.